


# Ársins lið - 2001

**Til stuttleikar – og ivaleyst eisini sum upplegg til trætumál – hava vit her á Sosialinum sett eitt lið saman, sum vit geva heitið, ársins lið 2001**

ÁRSINS LIÐ
*Jákup Mørk*

Tá ársins eitt og annað skulu kjósast, er tað aloftast soleiðis, at fólk eru ymisk á máli um, hvussu røtt avgerðin um hetta hevur verið. Soleiðis verður helst eisini við niðanfyri standandi, men kortini hava vit so valt at sett eitt lið saman, út frá tí, sum mongu fótbóltsleikararnir kring landið hava sýnt í landskappingini síðani mei mánað.

## Fimm meistarar

Ikki óvæntað eru tað greipuvinnararnir úr B36, sum seta sín týðiliga dám á liðið, men hetta merkir tó ikki, at vit hava verið ivaleysir í valinum, tá liðið er sett saman.

Leikarar sum eitt nú toppskjúttin í landskappingini, Helgi L. Petersen, rumenski áleyparin hjá EB/Streymi, Sorin Anghel, stjørnuskotið úr Vágoynni, Tór-Ingar Akselsen og verjuskansin á landsliðnum, Hans Fróði Hansen, teljast ivaleyst millum teir, sum fleiri vildu havt á eitt slíkt lið, fyri bert at nevna nøkur nøvn. Í fótbólti er tað tó eina ferð soleiðis, at rúmd bert er fyri ellivu monnum í senn, og soleiðis verður tað eisini hesa ferð.

Sum útgangsstøði hava vit valt eina 3-5-2 spæliskipan, har fleiri av leikarunum eru teir ógvuliga framrættaðu, og soleiðis hava vit eisini nýtt tveir vongverjar, sum meira ella minni hoyra heima í álopinum, men sum eisini hava víst góð evni í síðunum.

## Blandað verja

Fyri at byrja í málinum, so hava vit har set mannin, sum varð kendur við topphúgvuni, men sum síðani í so nógv ár hevur prógvað sítt virði ímillum stengurnar.

Umframt at hann sum vant hevur sýnt stórspæl í NSÍ málinum, so má tað sigast at vera merkisvert, at ein leikari, sum hevur roynt somikið nógv, framvegis kann fara so eldhugaðu til verka á vøllinum. Jens Martin dugir sum fáur at motivera seg sjálvan, og sum ein annar Schmeichel megnar hann eisini at skipa spælið hjá liði sínum langt niðan á mótstøðuhálvuna. Tað kann væl vera, at NSÍ bert gjørdist nummar fimm í ár, men av teimum 28 stigunum, sum teir fingu, mundi málverjin tryggjað teimum í øllum førum fjórðingin.

Sum verjuskipara hava vit valt Jón Róa Jacobsen úr HB. Ungi HB-leikarin hevur verið størsti glottin í einum HB-liði, sum í ár hevur havt eina óvanliga trupla tilveru, og tað má sigast at vera sera flott av einum somikið ungum leikara. Ikki minst, tá fleiri av teimum meira royndu ikki hava takla kreppuna í felagnum eins væl.

Afturat honum hava vit valt Pól Thorsteinsson úr B36 og Bartal Eliasen úr GÍ. Hóast hvørgin teirra í løtuni er á landsliðnum, so er lítið at ivast í, at teir hava verið stinnastu verjuleikararnir í landinum í ár. Í luftini er helst eingin, sum kemur nær námind Bartali, sum annars eisini er landsliðsleikari í flogbóli, meðan Pól neyvan finnur sín yvirmann niðri á vøllinum, og saman vildu teir tí helst verið ein nærum óhugnaliga sterk verja.

## Pólverjin hevur verið framúr

Á miðvøllinum er Klæmint Matras úr B36 settur sum ventilurin ímillum verju og álop. Hann er ein leikari, sum veruliga hevur fingið sítt gjøgnumbrot í ár, og sum nú eisini verður løntur av landsliðsvenjaranum fyri síni avrik.

Framman fyri Klæmint hava vit sett teir báðar, Fróða Benjaminsen úr B68 og Zdzilaw Janik úr GÍ. Fróði hevur í ár, og serliga eftir at Øssur Hansen fór til Danmarkar, verið sentrali persónurin í spælinum hjá B68, sum alt í alt rakk til bronsumerki. Í Gøtu eru helst nøkur, sum halda, at týdningurin hjá eitt nú Magna Jarnskor hevur verið størri, enn hjá Zdzislw – Gigi – men pólski miðvallarin hevur til tíðir sýnt spæl, sum er flokkar oman fyri tað vanliga í Føroyum, og tí verður hann tikin fram um her.

Í borðunum hava vit sett teir báðar, Heðin á Lakjuni og Jákup á Borg, sum báðir eru úr B36. Heðin hevur kanska havt sítt besta kappingarár í ár, og skjóti lámurin hevur avgjørt verið millum lyklaleikararnar í gullstríðnum. Jákup hevði í fjør ein lítlan persónliga niðurtúr, men í ár hevur hann aftur prógvað seg sum ein hin mest evnaríka leikaran í landinum.

## Nógvir um boðið

Í álopinum hava sjálvandi eisini verið fleiri evni, men orsøkirnar til, at valið fall á Kurt Mørkøre úr KÍ og liðskiparan hjá B36, John Petersen, eru tó hampuliga greiðar.

Kurt hevur undir rættiliga truplum umstøðum skotið mál í øllum landskappingardystunum, síðani hann kom aftur til Føroya, og hetta má metast sum eitt einastandandi flott avrik. John hevur onkun tíð skotið fleiri mál enn í ár, men evnini hjá honum at binda verjuleikarar, og har við skapa pláss til aðrar, eru framúr, eins og evnini at halda bóltinum, og tí vil hann altíð vera ein sera týdningarmikil leikari, líka mikið hvørjum liði tað er á.

Sum sagt í byrjanini, so kann altíð tosast aftur og fram um, hvørt tann og tann leikarin er hin rætti, og liðið á talvuni skal avgjørt ikki skiljast sum tann ævigi sannleikin um kappingarárið 2001. Hetta er bara okkara boð.



GÍ-B71 3-0 (1-0):

# Sandoyingar eiga framvegis vónina

**Tað var ongantíð ivi um, at GÍ fór at vinna sannførandi sigur og harvið at staðfesta silvurkrónurnar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Bæði gøtumenn og sandoyingar plaga at spæla øi gulum troyggjum og bláum buksum. Reglurnar siga, at tá talan er um sovorna støðu, skal útiliðið skifta, og tí høvdu sandoyingar leygardagin skift til bláar troyggjur, tá teir vitjaðu í Sarpigerði.

Eingin ivi var um, hvat tað var fyri eitt lið, sum mesta partin av árinum hevur verið við í stríðnum um gullkrónurnar, og hvat tað var fyri eitt lið, sum alt árið hevur verið við í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting.

GÍ var greitt omaná. Teir vunnu 3–0, og spurningurin verður ongantíð svaraður, um teir høvdu verið førir fyri at vunnið við somu sifrum, sum teir fyrr í summar vunnu við á Sandi. Tá var úrslitið 7–0. Hesa ferð vóru gøtumenn kanska ikki so motiveraðir, sum teir vóru ta ferðina. Silvurmerkini fóru ongan veg, og tað var eingin møguleiki at vinna gullmerkini.

Sandoyingar tóktust longu frammanundan greiðir yvir, hvat tað var, sum kundi bjarga teimum ein eyka møguleika í bestu deildini. Tað var FS Vágar tap og HB sigur í Gundadali.

B71 royndi at sprutta, og teir høvdu onkrar royndir ímóti veteraninum í GÍ málinum, Peter Holm. Eitt nú vóru veteranarnir Kári Reynheim og Eli Hentze upp á spæl við langskotum, sum kortini ikki vóru serliga vandamikil.

## Málini

Gøtumenn høvdu nógvar málmøguleikar, og enn eina ferð vísti Valdemar Nowisci í B71 málinum, at hóast hann hevur nátt rættuliga høgan fótbóltsaldur, so hevur hann framvegis stóran týdning fyri sandoyingar.

Fyrsta málið kom, tá tjúgu minuttir vóru farnir. Magni Jarnskor varð feldur í brotsteiginum, og yngri beiggin, sum í ár hevur verið sera støðugur og væl meiri sannførandi, enn hann hevur verið seinastu árini, var púra kaldur úr ellivu metrum.

Næsta málið kom ikki fyrrenn seinna umfarið var tólv minuttir gamalt. Tá fór allur spenningurin úr dystinum, sum eisini gjørdist týdningarleysur orsakað av, at málini skolaðu ígjøgnum hjá FS Vágar í Gundadali.

Sandoyingar høvdu stutt frammanundan bjargað á strikuni, men teir høvdu ongan møguleika, tá veteranurin Jóan Petur Olsen, sum loysti burturstadda Poul Ennigarð av í miðverjuni, úr vinstru stútaði í umvegis handara stólpan og í kassan.

Tað restaðu átjan minuttir, tá GÍ setti nøglina í, og sjálvandi var tað arbeiðssami toppskjúttin í bestu deildini, Helgi L. Petersen, sum átti síðsta fótin á, eftir at B71 málverjin hevði hálvbjargað langsskotisroynd.

Gøtumenn fóru undir brúsuna og í vetrarfrí, eftir at teir høvdu fingið silvurmerkini. Sandoyingar fóru eisini undir brúsuna, men teir sleppa ikki í vetrarfrí. Komandi leygardagarnar skulu teir spæla ímóti Skála. Hetta var vónin, sum teir høvdu, tá teir komu til Gøtu, og hóast teir taptu, so livdu teir eisini í hesi vónini, tá teir aftur fóru um Skopunarfjørð.

**Dysturin í tølum:**
**GÍ-B71 3-0 (1-0)**
1-0: Henning Jarnskor (br.) 20
2-0: Jóan Petur Olsen 57
3-0: Helgi L. Petersen 72
**Dómari:** Lassin Isaksen (KÍ)

**GÍ:** Peter Holm – Bartal Eliassen, Jóan Petur Olsen, Leivur Hansen – Áslakur R. Petersen, Poul Henning Jacobsen, Magni Jarnskor, Zdzislaw Janik, Henning Jarnskor – Óli Hansen, Helgi L. Petersen
**B71:** Valdemar Nowisci – Hans Jørgen Djurhuus, Jógvan Jón Petersen, Bernhard Petersen, Bjørn Thorsteinsson, Svenning W. Hansen – Jón Brekku, Kári Nielsen, Sverrir Kjærbo – Eli Hentze, Kári Reynheim



*Ivi var ongan tíð um, hvør fór at vinna dystin í Gøtu, men hóast tapið, so varveittu sandoyingar vónina fyri at verða í bestu deildini*

# Veteranur vardi GÍ málið



*Tað eru 12 ár síðani, at Peter Holm seinast vardi málið hjá gøtumonnum, men sunnudagin var hann so aftur at síggja*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Tá tveimum teimum bestu málverjunum bórust frá var neyðugt at brúka Peter Holm, sum í ár hevur hugnað sær í 3. deild**

FÓTBÓLTSTOS
*Jóannes Hansen*

Tað kom púra óvart á, at GÍ kom á vøllin við nýggjum málverja leygardagin. Hallur Hansen hevði vart málið frammanundan, men leygardagin, tá Dánjal Andreasen frá FSF kom til Gøtu við silvurmerkjunum, var Peter Holm í málinum. Peter spældi í síni tíð við besta GÍ liðnum, men nú eru tað nøkur ár síðani, at hann hevur verið við. Jens Martin Knudsen, Sunnvard Joensen, Rúni Joensen og Hallur Hansen hava verið GÍ málverjar.

Hvussu bar tað til, at teir sendu boð eftir tær?

– Tað var tí, at tað barst málverjunum bæði í 1. og 2. deild frá. Hallur Hansen varð vøddakaddur undir arbeiði, og Mortan Joensen var leikbannaður eftir síðsta dystin á 2. deildarliðnum. Hann var spældur í Gundadali ímóti HB.

Nær fekst tú boð?

– Johan Nielsen ringdi fríggjadagin og bað meg um at spæla. Eg segði ja beinanvegin. Eg rokni við, at hinir 1. deildarspælararnir hjá GÍ hava vant meiri um vikuna í ár, enn eg havi vant alt kappingarárið, men eg havi fingið dystarvenjing í 3. deild. Eg roknaði ongantíð við, at tað fór at verða so nógv upp á spæl ímóti B71, og tað vísti seg at verða soleiðis. Um talan hevði verið um ein meiri týdningarmiklan dyst hjá GÍ, so hevði eg ivaleyst hugsað meg tvær ferðir um, áðrenn eg hevði játtað, sigur Peter Holm, sum einar tríggjar ella fýra ferðir strekti seg eitt sindur eftir skotroyndum frá sandoyingum.

Hvussu langt er tað síðani, at tú síðst vardi málið hjá GÍ í 1. deild?

– Eg eri javngamal við Jóan Petur Olsen og Magna Jarnskor, sum eisini spældu við leygardagin. Eg var á 1. liði í 1985. Í 1986 vóru vit flutt til Fuglafirðar at búgva, og tá spældi eg við ÍF. Í 1987 kom eg út aftur til GÍ, og eg spældi eitt sindur, inntil eg í 1989 fór niður í lestrarørindum, men tað vórðu ikki so ógvuliga nógvir dystir á besta liðnum, tí tá hevði GÍ eingilskt mannin Carl Whitehouse í málinum. Tá eg var heima í summarfrí í 1992 spældi eg nakrar fáar dystir. Tað vóru teir fyrstu hjá mær við Johan Nielsen sum venjara, og tá eg nú leygardagin aftur fekk kjansin, var Johan Nielsen framvegis venjari, sigur Peter Holm, sum avgjørt ikki komandi ár ætlar sær at vera við í kappingini um málverjuplássið hjá GÍ.